## DAGSINS MEINING

# Stjórnarskifti í Noregi

Norska valið gjørdist ein stórsigur fyri reyð-grønu samgonguna. Arbeiðaraflokkurin fekk 32,8% av atkvøðunum og gjørdist sostatt annar stóri vinnarin. Reyð-grøna samgongan hjá Jens Stoltenberg fekk 88 tingmenn, meðan borarligi vongurin stóð eftir við 81 tingmonnum Stóru taparanir vóru Høgra og Kristiligi fólkaflokkurin. Tann stóri spurningurin, sum mong seta sær, er, hvussu tað ber til, at stjórnin í heimsins ríkasta og besta landi kundi missa meirilutan. Orsøkirnar tykjast vera fleiri. Ein orsøk er, at stjórnin framdi fleiri sera illa dámd inntriv fyrst í farna valskeiði. Ein onnur orsøk er tann, at Framburðsflokkurin hevur yvirhálað teir stóru borgarligu flokkarnar høgrumegin. Við sínum populistiska politikki, sínum sterkt høgravenda útlendingapolitikki hevur FRP virkað sum eitt áhugavert borgarligt alternativ. Tað er beinleiðis óhugnaligt, at ein so populistiskur og høgravendur flokkur skal fáa so stóra undirtøku í einum av okkara næstu grannalondum!

Kjeld Magne Bondevik fer nú úr norskum politikki. Hann hevur ikki havt nakað lætt starv hesi seinastu fýra árini, tí ósemjan hevur verið stór í samgonguni, eins og trupulleikar hava verið í hansara egna flokki. Bondevik hevur vunnið sær mikla virðing á altjóða politisk pallinum. Undir hansara leiðslu er Noreg vorðið undangonguland á humanitera økinum. Noreg er í fremstu røð at veita hjálp, har neyðin er størst og mangan hevur Noreg verið púra einsamalt saman við ST at linna neyð og veita hjálp ymsa staðir í Afrika. Eisini á stórpolitiska økinum hevur Bondevik stor úrslit at vísa á. Noreg hevur havt ein høvðusleiklut í friðarsamráðingum á Srilanka, í Miðeystri, í Sudan og í Indonesia. Soleiðis hevur Bondevik livað upp til sína kristnu og humanistisku lívsáskoðan. Sjálvur fall hesin høgt mentaði og siðiligi humanisturin, Bondevik, ongantíð fyri populistisku freistingini, hóast mangan var høvi til tess og tað ivaleyst hevði givið atkvøður.

Nú verður so stjórnarskifti. Ein orsøkin er tann, at Arbeiðaraflokkurin við einum siðbundnum javnaðarpolitikki í valskránni stóð fram sum eitt sera trúverdugt og gott alternativ til borgarliga politikkin. Hóast stóra ríkidømið hevði tað ikki eydnast borgarligu minnilutastjórnini at vinna á nøkrum heilt grundleggjandi samfelagstrupulleikum so sum undirvísing, almanna- og heilsumálum. Áhaldandi og sera primitivu populistisku atfinningarnar frá FRP gjørdu tað ikki lættari hjá Bondevik at reka skynsaman borgarligan politikk, sum samstundis varðveitti vælferðarsamfelagið.

Við hesum bakstøði er tað væl skiljandi, at veljarin vendi sær til Stoltenberg, ið kundi leggja fram ein púra kláran sosialdemokratiskan vælferðarpolitikk. Hesin politikkur hevði børnini, skúlaskapin, granskingina, eldraumsorgan, heilsu og umhvørvi sum fokus. Tað er einki at ivast í, at fyri fjøldina av norska fólkinum kemur stjórnarskiftið í tøkum tíma. Hóast Noreg er heimsins ríkasta land er so sum so við vælferðini. Hetta fer nýggja stjórnin at bøta um. Noreg er ein av okkara næstu grannum. Spennandi verður at vita, um nýggja stjórnin fer at vísa grannunum fyri vestan størri ans enn fráfarandi stjórnin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# 14. september - læra vit av søguni?

**Opin fyrispurningur til søgulærarar og skúlaleiðslur í fólkaskúlanum og á miðnámsskúlum**

**Høgni Hoydal**



Í morgin eru 59 ár liðin síðani føroyingar atkvøddu fyri loysing á fólkaatkvøðuni 14. september 1946.

Hetta er fyrsta og einasta ferð, Føroya fólk er spurt beinleiðis um sína framtíðarstøðu. Føroyingar skuldu velja millum eitt danskt uppskot um heimastýri ella at gerast sjálvstøðug tjóð.

Meirilutin valdi loysing og vrakaði uppskotið um heimastýri.

Kortini fingu vit heimastýri og hava tað enn.

**Avleiðingarnar av vantandi fólkaræði**

Síðani ber til at hyggja at avleiðingunum. Fólkaræðisliga kunnu vit helst - uttan mun til partapolitiska litin - semjast um, at tað er brot á allar fólkaræðisligar mannagongdir, at avgerðin á fólkaatkvøðuni ikki varð sett í verk.

Men til ber eisini at hyggja at avleiðingunum fyri politisku ábyrgdini í landinum, fyri búskaparligu menningini, fyri sosialu menningini og møguleikunum at búleikast í einum heimi, sum broytist skjótari og alsamt.

**Nýggir upplýsingar komnir fram**

Seinastu árini er eisini nógv áhugavert søgutilfar komið fram um ta politisku telvingina í sambandi við fólkaatkvøðuna í 1946.

- Vit vita tildømis (í "Svørtu Bók" um Føroyar í kalda krígnum), at trýst varð lagt á Danmark bæði úr USA, Bretlandi og Sovjettsamveldinum at forða einum sjálvstøðugum Føroyum, tí allir partar óttaðust fyri, at hin parturin skuldi fáa hernaðarstøðir í Føroyum.
- Undan kavi eru komin skjøl, ið vátta, at longu í 1946 vórðu ætlanir lagdar í danska Forsætismálaráðnum um at gera Føroyar heftar av donskum studningi, so politisku flokkarnir sleptu sínum sjálvstýrispolitikki.
- Eisini er váttað, at Føroyar hava verið nýttar sum ein finna í einum stórpolitiskum talvi undir kalda krígnum, har vit vóru bumbumál - og at ein tilvitað villleiðing fór fram frá donskum myndugleikum mótvegis Løgtinginum og almenninginum í Føroyum.
- Og skjalfest er, at USA legði trýst á Danmmark um at senda meira pening til Føroya til tess at "doyva loysingarrørsluna", áðrenn hernaðarstøð varð bygd í Føroyum.

Hetta er alt tilfar, ið óheftir granskarar hava gjørt og sum er givið út á prenti.

**Læra vit um hetta í skúlunum?**

Næsta ár verða 60 ár liðin síðani fólkaatkvøðuna í 1946. Tí loyvi eg mær at seta ein almennan fyrispurning til bæði einstøku lærararnar í søgu og samtíðarkunning og til skúlaleiðslurnar á fólkaskúlunum og miðnámsskúlunum:

- Verður undirvíst í hesum evni í skúlunum?
- Og finst nakað skipað tilfar, ið gevur næmingunum høvi at seta spurningar, kanna og viðgera hesar týdningarmiklu hendingar í føroyskari søgu? - Hetta eru jú viðurskifti, ið hava beinleiðis týdning fyri dagsins samfelag og fyri framtíðarstøðu Føroya.
- Verður í sambandi við 14. september høvið nýtt til at kasta ljós á søguna og evnir, ið eru tengd at hesum?

Eg vildi fegin fingið svar frá onkrum. Eg minnist meg ikki í míni skúlatíð at hava fingið nakrar upplýsingar um fólkaatkvøðuna og nær tengd evni, fyrr enn eg gekk á HF-skeiði sum 19 ára gamal.

**Partapolitikkur ongin undanførsla**

Nú veit eg væl, at nógv halda, at tað kann gerast ov partapolitiskt at taka eitt slíkt evni upp. Men tað er eftir míni bestu sannføring ein undanførsla, sum ikki hevur hald í veruleikanum. Søguligu hendingarnar og teir upplýsingar, ið vit hava, kunnu viðgerast kritiskt og við møguleikum fyri at lýsa allar tættir. Ein møguleiki hevði tildømis verið at bjóða politikarum við ymsum áskoðanum at kjakast um ymsu útleggingarnar av fólkaatkvøðuni, og gongdini síðani.

Mín egna fatan er vælkend. Vit hava ikki lært av søguni. Hinvegin haldi eg, at vit júst hava endurtikið søguna. Eftir eitt tíðarskeið, har vit hava havt ein greiðan meiriluta millum føroysku veljararnar at gerast sjálvstøðug tjóð, hevur danska stjórnin í staðin bjóðað eitt nýtt heimastýri. Tað hevur løgtingsmeirilutin góðtikið í summar við at samtykkja tvær danskar lógir, ið staðfesta danskt yvirvald í Føroyum - uttan at fólkið yvirhøvur er spurt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.